

*24 ára gamla Jessica Alba er nýggja stóra stjørnan í Hollywood, og hon er nú við í fleiri av teimum stóru filmunum, sum verða framleiddir til hvíta tjaldið.*

# ALBA BLEIKTRAR í HOLLYWOOD

24 ára gamla Jessica Alba er við at sláa sítt navn fast sum næsta stóra films-stjørnan í Hollywood. Hon kom fram í sjónvarpsrøðini Dark Angel, men nú hevur hon tikið fetið inn í tann stóra filmsidnaðin í Holly-wood, og hon kann nú upplivast í filmum sum Sin City og Fantastic Four.
Jessica Alba varð fødd í býnum Ponoma í California, men familjan flutti til Missis-sippi at búgva í eina tíð. Pápi hennara starvaðist inn amerikanska flogvápni, og eftir nøkur ár fluttu tey aftur til California at búgva.
Jessica dámdi væl at spæla sjónleik sum barn, og tá ið hon var 12 ára gomul fór hon á sjónleikar-skeið. Hon fekk stutt eftir ein umboðsmann, og síð-ani hevur tað gingið stútt fram á hjá henni. Hon hevði fyrst nógvar smærri leiklutir í filmum og sjónvarpsrøðum, men uppgávurnar fór at vaksa, og ikki minst høv-uðsleikluturin í sjónvarps-røðini Dark Angel gjørdi hana væl umtókta.
Nú er hon flutt ein flokk upp og spælir við í stóru filmunum, sum verða fram-leiddir í Hollywood. Næsta stóra uppgávan verður ein nýggj filmsinnspæling av sjónvarpsrøðini I Dream of Jeannie, sum var væl um-tókt í 60'unum.

## HITLIST

| 15 tær bestu | | ÚF |
|---|---|---|
| 01 | Orkestriiið har vestriii | 1 Veit iii |
| 02 | Kim Hansen | Maria |
| 03 | Nephew | En Wannabe Darth Wader |
| 04 | James Blunt | You're Beautiful |
| 05 | Nephew | Worst/Best Case Scenario |
| 06 | Green Day | Wake Me Up When September Ends |
| 07 | Anna David | Fuck Dig |
| 08 | 200 | Mamma |
| 09 | Lív Hansen | Eitt Annað Land |
| 10 | U2 | City of Blinding Lights |
| 11 | Black Eyed Peas | Don't Lie |
| 12 | Gwen Stefani | Cool |
| 13 | Eminem | Ass Like That |
| 14 | Crazy Frog | Popcorn |
| 15 | Høgni Lisberg | Morning Dew |

| Tjeklisten | | DR |
|---|---|---|
| 01 | James Blunt | You're Beautiful |
| 02 | Green Day | Wake Me Up When September Ends |
| 03 | Daniel Powter | Bad Day |
| 04 | Tue West | Tankespind |
| 05 | Anna David | Fuck Dig |
| 06 | Mew | Apocalypso |
| 07 | Juncker | Hvis Din Far Gi'r Dig Lov |
| 08 | U2 | City of Blinding Lights |
| 09 | Johnny Deluxe | Det Du Gør |
| 10 | Coldplay | Speed of Sound |
| 11 | Nik & Jay | Strip |
| 12 | Sterling | Ubesvaret Opkald |
| 13 | Magtens Korridorer | Lorteparforhold |
| 14 | Jakob Sveistrup | Love Goes On |
| 15 | Ben Moody ft. Anastacia | Everything Burns |
| 16 | Bikstok Røgsystem | Fabrik |
| 17 | Christian Walz | Wonderchild |
| 18 | Amy Diamond | What's In It For Me |
| 19 | Crazy Frog | Axel F |
| 20 | Craig David | All The Way |

| Top of the Pops | | BBC |
|---|---|---|
| 01 | Oasis | The Importance Of Being Idle |
| 02 | Rihanna | Pon De Replay |
| 03 | Daniel Powter | Bad Day |
| 04 | Simon Webbe | Lay Your Hands |
| 05 | James Blunt | You're Beautiful |
| 06 | Black Eyed Peas | Don´t Lie |
| 07 | Girls Aloud | Long Hot Summer |
| 08 | McFly | I'll Be OK |
| 09 | Kaiser Chiefs | I Predict a Riot |
| 10 | White Stripes | My Doorbell |
| 11 | Freemasons ft. Amanda Wilson | Love on my Mind |
| 12 | Crazy Frog | Popcorn |
| 13 | Kelly Clarkson | Since U Been Gone |
| 14 | Goldfrapp | Ooh La La |
| 15 | The Rolling Stones | Streets of Love |
| 16 | Babyshambles | F*** Forever |
| 17 | Ciara ft. Ludacris | Oh |
| 18 | Akon | Bananza |
| 19 | Amerie | Touch |
| 20 | Mint Royale | Singin' In The Rain |

| Billboard | | Billboard |
|---|---|---|
| 01 | Mariah Carey | We Belong Together |
| 02 | The Pussycat Dolls | Don't Cha |
| 03 | Rihanna | Pon de Replay |
| 04 | Mariah Carey | Shake It Off |
| 05 | Bow Wowo ft. Omarion | Let Me Hold You |
| 06 | Missy Elliot og fleiri | Lose Control |
| 07 | Lifehouse | You And Me |
| 08 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 09 | Bow Wow ft. ciara | Like You |
| 10 | D.H.T | Listen To Your Heart |
| 11 | The Click Five | Just The Girl |
| 12 | Ludacris ft. Bobby Valentino | Pimpin' All Over The World |
| 13 | Gwen Stefani | Cool |
| 14 | Weezer | Beverly Hills |
| 15 | Fall Out Boy | Sugar, We're Goin' Down |
| 16 | Gorillaz | Feel Good Inc. |
| 17 | The Black Eyed Peas | Don't Lie |
| 18 | Gwen Stefani | Hollaback Girl |
| 19 | Destiny's Child | Cater 2 U |
| 20 | Fat Joe ft. Nelly | Get It Poppin' |



## STÓRROYKJ-ANDI APA

26 ára gamla apan Aiai roykir sum ein turkur. Tað var í 1989, at apan, sum býr í einum djóragarði har norðuri í Kina fór at roykja fyrstu ferð. Tað hendi, eftir at makin hjá henni doyði. Tá ið næsti makin doyði í 1997, fór hon at roykja verri, enn hon hevði gjørt. Tey, sum varða av djóragarðinum, sigga, at tey ætla sær at fáa apuna at leggja av – og tað skal gerast við at finna henni ein nýggjan maka.

## FILMSSTJØRNA RÝMDI

16 ára gamla Scout Tay-lor-Compton, sum hevur spælt við í fleiri filmum og sjónvarpsrøðum, hvarv heimaífrá tann 12. au-gust, og í meira enn tvær vikur varð leitað allastaðni eftir henni. Unga gentan, sum hevur verið í eitt nú Gilmore Girls og Ally, var at enda funnin, tá ið ein lærari á skúlanum hoyrdi ein drong tosa um, at Scout hevði sovið heima hjá honum. Tað visti seg, at Scout hevði goymt seg á einum spæliplássi í ein-ari park, til ein familja hevði funnið hana og giv-ið henni mat og eina song. Hetta fekk dreingin í húsinum at erpa sær í skúlanum, og tað endaði við, at løgreglan fann ungu sjónleikarkvinnuna. Scout hevur sagt, at hon fór heimaífrá orsaka av persónligum trupulleikum.





## ORKSETRIIIÐ Á TOPPIIII

Aftur hesa vikuna er Orkestriiið har vestriii ovast á 15 teimum bestu við sanginum 1 veit iii. Stuttligi sangurin, sum bæði við orðum og tónleiki byggir á sokallaða vágasoundið, hevur rættiliga vunnið fram millum ungdómin, og tey hava aðru vikuna á rað atkvøtt sangin inn sum nummar 1 á 15 teimum bestu.